# Norskur festivalur vil hava føroyingar



200 og Eivør luttóku í ár norska festivalurin, By: Larm. Men festivalurin, ið ofta verður sammettur við Spotfestivalin í Århus, hevur í eina tíð víst Føroyum áhuga, eitt nú var ein av fyrireikarunum dómari á GBOB í fjør. Nú boðar festivalurin frá, at tey taka ímóti tilmeldingum til festivalin komandi ár. Til ber at melda seg til á heimasíðuni hjá festivalinum bylarm.no/backstage/artists/new. Fróði Vestergaard úr Norðurlandahúsinum sigur við Sosialin, at festivalurin hevur boðað frá, at tey eru áhugaði í, at føroyskir bólkar tilmelda seg.

# Mannaátarar biðja um umbering

Altjóða gongdin at biðja um umbering fyri syndirnar frá fortíðini hevur nú eisini rokkið mannaátarar í einum ættarbólki á Papua Ny Guinea. Teir biðja um umbering fyri at forfedrar teirra drupu, kókaðu og ótu fýra kristnar trúboðarar úr Fiji-oyggjunum í 1878. Umberingin kom í sambandi við eina seremoni herfyri í býnum Rabaul í East New Britain-landslutinum. Í øðrum førum bað fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup í 1998 um umbering fyri tvangsflytingina av Thule-búgvum í Grønlandi eina hálva øld áðrenn, meðan Johannes Paul II bað um umbering fyri kristnu forfylgingina av jødunum. Týskland hevur ferð eftir ferð biðið um umbering fyri Holocaust, og Canada hevur gjørt tað sama fyri viðgerina av teirra upprunafólkum.




*Simona og Arvid eru tvey av teimum nýggju andlitunum, ið helst verða fólkaogn, tá »Eg elski Føroyar« kemur í sjónvarpið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sjúrður ger nýggja sjónvarpsrøð

**Helvtin av »Pipar & Salt«, Sjúrður Skaale, hevur skapt eina røð av persónum og søgugongdum, sum í hesum døgum verður tikin upp kring Føroyar. Fyrst í komandi ári verður hetta til sjónvarpsrøðina »Eg elski Føroyar«**

SJÓNVARP
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Vit hitta Arvid og Simonu í plantasjuni í Havn, Arvid smakkar sær á eina øl, kassin frá Føroya Bjór er hálvtómur og er vælegnaður sum rygglen. Hóast húðin er merkt av ringum reinføri og drukki, og klæðini ikki beinleiðis eru nýggjasti móti, so eru Arvid og Simona bæði sannførd um sína egnu fortreffiligheit.

Hetta eru tveir av persónunum í sjónvarpsrøðini »Eg elski Føroyar«, ið Sjúrður Skaale hevur skrivað og sjálvur spælir við í. Sjúrður er Arvid, og ein rúgva av øðrum persónum í skemtirøðini, ið verður tikin upp í hesum døgum. Komandi viku gongur leiðin til Danmarkar, har tey skulu taka upp eina røð av sketjum um føroyingin Nu, sum hatar alt danskt, men er búsitandi í Keypmannahavn og giftur við eini danskari konu, greiður Bjarni Rubeksen frá, ið er myndamaður á skemtirøðini.

## Ikki Pipar & Salt

Sjúrður Skaale hevur saman við Jákup Weyhe staðið fyri meginpartinum av skemtisendingunum, ið hava verið í føroyskum sjónvarpi seinastu tíggju árini, men »Eg elski Føroyar« er hvørkið »Pipar & Salt«, »Kreppukabarettin« ella »Flatt av Flatlondum", vísur Sjúrður Skaale á.

Sjúrður heldur at tað er stuttligt at royna at arbeiða saman við nýggjum fólki, og fáa íblástur frá teimum, og hesaferð hevur Sjúrður funnið saman við Elini á Rógvu, ið leikstjórnar røðini og einum sjónleikarabólki, ið umfatar bæði nýggj og roynd nøvn. Á rollulistanum eru umframt Sjúrð, Elsa Maria Olsen, ið m.o. spælir Simona, Lív Reynheim og Bárður Persson. Men eisini onkur annar verður við. Ljóðarbeiðið standa Eyðbjørn við Skipá og Pauli

## Seks partar

Skemtirøðin verður í seks pørtum og verður send í sjónøvarpinum beint eftir nýggjár. Hettar eru ymiskar røðir av sketjum, og alt er spildurnýtt tilfar skrivað til »Eg elski Føroyar«, og teir persónarnir, vit hitta í røðini, eru skaptir til hesa røðina.

Sangirnir eru nýskrivaðir av Sjúrða og føroysku poppsmiðirnir Eyðfinn Jensen og Kári Jacobsen standa fyri tónleikapartinum. Hesir eru m.a. kendir sum menninir aftan fyri gentubólkin Poppkorn, so her verður uttan iva talan um léttsvølgdan popp.

Búnarnir hevur Anna Kristin Bæk staðið fyri, og skulu vit døma eftir búnunum hjá Arvid og Simonu, so er hon komin væl frá uppgávuni.